# H. C. Andersen í Klaksvík

**Klaksvíkar býráð, sum er vinarbýur við føðibýin hjá H. C. Andersen - Odense, hevur saman við Atlantis og skúlunum fingið fatur á "H. C. Andersen Paraduni". Tey framføra ævintýrleikir eftir H. C. Andersen**

TÍÐINDASKRIV
*Klaksvíkar kommuna*




*í sambandi við at tað í ár eru 200 ár liðin síðani HC Andersen varð borin í heim, hevur Klaksvíkar kommuna saman við skúlunum og Atlantis fingið HC Andersen paraduni úr Odense at koma til Føroyar í døgunum 3. til 6. februar*

Í døgunum 3. til 6. februar kemur H. C. Andersen Paraden til Føroyar. Klaksvík og Odense eru í vinarbýarsamstarvi, og tað ger uttan iva sítt til, at tað júst er H. C Andersen paradan, sum kemur hendanvegin um tríggjar vikur.

Tey kunnu bert koma til Føroyar hesar dagarnar, tí alt komandi ár eru tey upptikin av framførslum víða um. Ætlanin er, at tey framføra í skúlunum í Klaksvík, har skipað verður fyri serligum H. C. Andersen døgum. Eisini verða tey at síggja í Atlantis, SMS og møguliga í Norðurlandahúsinum.

Í 2005 eru 200 ár liðin síðani H. C. Andersen varð borin í heim. Nógv verður gjørt burtur úr - serliga í Danmark/Odense, men eisini úti í heimi. Ætlanin er eisini at gera nakað burtur úr herheima.

H. C. Andersen Paradan er ungdóms teaturbólkur, sum er víða gitin, og hevur havt framførslur í millum annað Kina, Hollandi, Belgu, Týsklandi og Onglandi, umframt í Danmark. Tey framføra á enskum, týskum og donskum máli.

Íklødd serliga prýðiligar búnar, sum hoyra ævintýrunum til, hava tey sermerkt seg við gjøgnumførdari skrá og hegnisligari samanseting úr flestu ævintýrunum eftir H. C. Andersen. Tónleikurin gevur eisini framførsluni góðan ævintýrdám.

Við í "H. C. Andersen Paraduni" eru 15 ungdómar og høvuðspersónurin "H. C. Andersen" - alias Torben Iversen, sum fortelur og er bindiliðið millum teir ymisku leikirnar.

Talan er um eitt tiltak, har øll familjan kann seta sær ein stóran kross í álmanakkan, fyri ikki at gloyma at minnast til eitt ógloymandi kvøld.




**Takk fyri**

Við hesum fara vit
at takka hjartaliga
fyri tær mongu heilsaninar
sum vit fingu móttøkudagin,
ein serstøk tøkk til tykkara
sum gleddu okkum
við at støkka á gólv.

Johan, M.C. & Martin
Fam. Justinussen
Birna & Ása

**P/F Hotel Hafnia**
**Tel 31 32 33 · Fax 31 52 50**
**hafnia@hafnia.fo**



## Støðleiðari í Vági

**Søkt verður eftir leiðara til nýggju støð okkara í Vági.**

**Starvið**
Støðleiðarin hevur dagligu leiðsluna av støðini.

Starvið umfatar:
Tænastu á hægsta stigi til kundar okkara
Àbyrgdarfull umsiting av starvsfólkum
Samskifti við veitarar
Samskifti við Høvuðsskrivstovu
Annars alt annað, sum neyðugt er fyri at náa settar ætlanir

**Vit bjóða**
Eitt trygt og sjálvstøðugt starv, við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Viðkomandi upplæring á øðrum Statoil-støðum fyrstu tíðina.
Møguleiki at luttaka á viðkomandi skeiðum.
Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

**Førleiki**
Nýggi leiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, virksemi innan handil og at nýta teldu geva fyrimun.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

P/f Statoil Føroyar
att. Sverri Steintún
Postboks 3098
Viðanes, FO 110 Tórshavn

innan 24. januar 2005.

STATOIL

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*